

# Samkomublaðið fyri sept/okt

# 2015

KELDAN

Okkara visión er, at Keldan skal vera ein andaligur miðdepil fyri allar Føroyar








www.keldan.fo

Samkomuleiðarapar: Pauli & Jastrid Høj. Tlf. 232511 & 232510

# Orðið



***Karstin Justesen***

"Men gøtan, ið hini rættvísu ganga, er lík skínandi ljósi,
sum verður bjartari og bjartari, inntil hádagur er." Orðt. 4.18.

Um vit lurta og hyggja eftir miðlunum í dag, hoyra vit øgiliga nógv keðilig tíðindir um neyð og elendigheit kring heimin. T.d. hoyra vit um flóttafólk í túsundatali, sum flýggja undan krígnum í miðeystri og koma til Evropa at søkja sær friðskjól. Eisini hoyra vit um ISIS, sum forfylgir og drepur kristin fólk (vantrúgvandi fólk) í hópatali. Vit síggja myndir inni á alnótini um, hvussu alt hetta fer fram, og tað er ræðuligt. Man stendur spyrjandi. Hvat fer alt at enda við? Hvussu fer okkara heimur at síggja út um nøkur ár?

Tá ið vit hoyra um alt hetta, kunnu vit lættliga blíva bangin og fara at stúra. Vit seta kanska spurningar til, hvat skal henda við teimum kristnu, sum eru í allari hesari neyðini? Kunnu tey siga, at gøtan blívur bjartari og bjartari inntil hádagur er? Hvat nú um hetta kemur til okkara leiðir? verða vit trygg? kunnu vit eisini tá sitera hetta versið?

Men Gud sigur í Sínum orði Filip. 4,6-7: "Stúrið ongum fyri, nei, latið í øllum tað, sum tit ynskja, koma fram fyri Gud í ákallan og bøn við tøkk! So skal friður Guds, sum stígur upp um alt vit, varðveita hjørtu og hugsanir tykkara í Kristi Jesusi."

Gud er ikki bundin av umstøðum, men hevur brúk fyri, at vit seta okkara fulla álit á Hann. Hann sigur, at so skal Hann verða við okkum, alt til veraldar enda, so kunnu vit hvíla trygt í Honum og ikki stúra. Vit syngja so sterkt í tí kenda sanginum, at Gud er Gud, um land alt legðist oyðið, og Gud er Gud um menniskjan øll doyði.

So um vit seta okkara álit 100% á Harran, leggja okkara lív niður fyri Hann, og liva fyri at elska, hjálpa, tæna og bjarga menniskjum, sum eru á okkara vegi, so skal Hann leiða okkum frá dýrd til dýrd og frá sigur til sigur. Líkamikið umstøður í tínum lívi og líkamikið, hvussu hesin heimurin sær út, og hvat kemur at henda, so kanst tú siga, at gøtan blívur lík skínandi ljósi, sum blívur bjartari og bjartari inntil hádagur er!

# Skrá fyri sept/okt

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 28. sept. | kl. 19.00: | Reach Out á Strondum |
| Týsdagur | 29. sept. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 30. sept. | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| | | kl. 19.00: | Undirvísing: "Dávid - ein maður eftir Guds hjarta, 2.partur" |
| Leygardagur | 3. oktober | kl. 21.00: | AWAKE við Tórfríð Danielsen<br>Evnið: Frelsan og sálarfrøði |
| Sunnudagur | 4. oktober | kl. 11.00: | Morgunmøti við Paula Høj<br>Innsavnan av tíggjund og heiløgum gávum |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 5. okt. | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 6. okt. | kl. 10.00: | Eingin bønardagur |
| Mikudagur | 7. okt. | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| Leygardagur | 10. okt. | kl. 21.00: | AWAKE við Eyð & Steffan Frederiksberg |
| Sunnudagur | 11. okt. | kl. 11.00: | Morgunmøti við Ólavi Jacobsen |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 12. okt. | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 13. okt. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 14. okt. | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| Leygardagur | 17. okt. | kl. 21.00: | Konsert við GIG (Gospel Invasion Group) |
| Sunnudagur | 18. okt. | kl. 11.00: | Morgunmøti við Ragnhard Petersen (skrivari fyri KFS) |
| | | kl. 18.00: | Evangeliskt møti við luttøku 65+ (trúarhetjur) |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 19. okt. | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 20. okt. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 21. okt. | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| Leygardagur | 24. okt. | kl. 21.00: | AWAKE við Helga Abrahamsen |
| Sunnudagur | 25. okt. | kl. 16.00: | Christmas Child (felagstiltak í Eysturoy) |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 26. okt. | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 27. okt. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 28. okt. | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| | | kl. 19.30: | “Heimurin og tú” Fyrilestur um kristna heimsáskoðan (sí meira undir Lýsingar) |
| Leygardagur | 31. okt. | kl. 21.00: | AWAKE við Euroclass |
| Sunnudagur | 1. okt. | kl. 11.00: | Morgunmøti við Maibritt Frederiksberg<br>Innsavnan av tíggjund og heiløgum gávum |

# Lýsingar

**Manslega í Kelduni**
Set X í kalendaran vikuskiftið 13-15 november, tí tá verður skipað fyri manslegu í Kelduni.
Legan er ætlað øllum monnunum í samkomuni yvir 18 ár.
Endamálið við leguni er at samansjóða, styrkja og uppbyggja menninar við góðari andaligari undirvísing, góðum mati og stuttligum tiltøkum.
Nærri kunning um leguna kemur seinni.

**Heimurin og tú**
Hetta er heiti á fyrilestri um heimsáskoðan, sum verður hildin í Kelduni mikudagin 28. okt. kl. 19.30.
Serligur dentur verður lagdur á kristna heimsáskoðan og á hvønn hátt henda áskoðan er øðrvísi enn aðrar heimsáskoðanir. Víst verður eisini á, hvussu okkara heimsáskoðan ávirkar okkara støðu til nógvar grundleggjandi spurningar.
Rúni Rasmussen heldur fyrilesturin.
Kaféterian er opin áðrenn og aftaná fyrilesturin.

**Mammukafé í Kelduni**
Annan hvønn hósdag í vetrarhálvuni verður ein mammukafé opin í Kelduni. Kaféin er serliga ætlað mammum við smáum børnum, men sjálvandi eru fastrar, mostrar, abbadiddur o.s.fr. eisini vælkomnar. Kaféin var fyrstu ferð opin hósdagin 24. sept., og hetta riggaði sera væl.

Mammukaféin verður opin hesar dagar í vetrarhálvuni: 8. okt., 22. okt., 5. nov., 19. nov. og 3. des., og hvønn dag er tað frá kl. 10:30 til kl. 13:00.

Allar, ið ynskja at hjálpa til við mammukaféini, kunnu siga Gittu frá (tlf. 211557), ella bara møta upp.

Ommubólkurin í Kelduni :)

## Gáva til samkomuna og samkomuvirksemið

Tíggjund/gáva til Kelduna kann flytast á kontu: 9181-1205066 og 6460-1568592
Gáva til missión kann flytast á kontu: 9181-1231369 og 6460-1568606
Gáva til útbygging kann flytast á kontu: 9181-7074346 og 6460-1568584